# Tagnarskyldan

samanborin við upplýsingar- og fráboðanarskylduna,



Sólja í Ólavsstovu, Løgfrøðingur

# Endamálið við reglum um tagnarskyldu

- Verja av privatlívi
- Tagnarskyldan neyðug fyri at borgarar skulu kunna hava álit á almennum myndugleikum.
- Upplýsingar- og fráboðanarskyldan trumfa yvir tagnarskylduna í ávísum førum



# Tagnarskyldan

Forboð ímóti

at lata trúnaðarupplýsingar víðari av órøttum, og

at nýta trúnaðarupplýsingar (ólógliga)



- Hvør er umfataður av tagnarskyldu, starvsfólk, vikarar, ráðgevarar, nevndarlimir v.m.
- Hvørjir upplýsingar eru umfataðir av tagnarskyldu, ásett í kunngerð ella annars neyðug atlit til:

  Privat áhugamál

  Almenn áhugamál
- Markið fyri tagnaskyldu - alment atkomuligur upplýsingur, men kann avdúka ein eyman upplýsing. T.d. ein bústaður
- Forboð at víðarageva upplýsingar, hóast hesir eru alment kendir
- Pligt at lata víðari til annan myndugleika



# Viðgerð av trúnaðarupplýsingum

Bert trúnaðarupplýsingar → 2 sløg av trúnaðarupplýsingum: → *helt privat* viðurskifti hjá einstakligum t.d.

→ ættarslag, trúgv, húðalitur, politisk, felagskaplig, kynslig ella revsiverd viðurskifti, heilsuviðurskifti, stórar almannatrupulleikar, rúsdrekka- ella rúsevnismisnýtsla → óformligt samtykki til innheintan → formligt samtykki til útflýggja

→ lógarheimild fyri innheintan ella útflýggjan → neyðugur liður í viðgerðini av einum máli (kærumál, eftirlitsmál, hoyring av sakkønum)

# Serligar eymar upplýsingar

- ættarslag, trúgv, húðalitur, politisk, felagskaplig, kynslig ella revsiverd viðurskifti,heilsuviðurskifti, stóraralmannatrupulleikar, rúsdrekka- ella rúsevnismisnýtsla



# Tagnarskylda FSL. § 26

"Stk. 2. Innan almenmi fyrisitingina kann <u>bert áleggast</u> tagnarskylda viðvíkjandi eini upplýsing, tá tað er <u>neyðugt</u> at halda hana loyniliga, fyri at verja serstøk fyrilit til ávís almenn ella privat áhugamál sum nevnd í stk 1. "

- Bert áleggjast, um hetta er kravt (neyðugt)
- Bert galdandi fyri starvsfólk ikki praktikantar o.l (skulu áleggjast tagnarskyldu



# Fráboðanarskyldan

HR: BVL. § **14**.:

- Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti,, at foreldur ella annar uppalari t.d. misrøkir, meinslar, misnýtir ella handfer barn soleiðis, at álvarsamur vandi er fyri tess sálarligu ella likamligu heilsu ella búning, hevur skyldu at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin.



# Tagnarskylda eftir bvl.51

**§ 51.** Øll, sum útinna tænastu ella arbeiði fyri eina fyrisiting ella stovn eftir hesi lóg ella eru limir í eini barnaverndarnevnd, Høvuðsbarnaverndarnevndini ella kærunevndum, hava tagnarskyldu sambært kapitli 8 í fyrisitingarlógini um tagnarskyldu v.m.



# Skyldu til at lata upplýsingar víðari

*Stk. 3.* Tað er tó ikki brot á tagnarskylduna, tá ið viðkomandi, sum hevur upplýsingar, hevur skyldu at geva teir víðari sambært hesi lóg, ella tá ið viðkomandi lógliga røkir greið almenn áhugamál ella lógliga virkar fyri at verja barnsins tørv.
*Stk. 4.* Tagnarskyldan stendur við, hóast viðkomandi fer úr starvi.



# Brot á fráboðanarskylduna

Revsing Bvl. § 73 :

Tann sum ikki boðar barnaverndartænastu frá

- revsaður við bót ella hefti upp til tríggjar mánaðir.



# Tagnarskyldan

- Revsing

1. bót, hefti ella fongsul í upp til 1/2 ár
2. skerpandi umstøður - fongsul upp til 2 ár

- Aðrar avleiðingar

1. disipliner reaktión (evt. uppsøgn)
2. endurgjald



# Meginregla

- Hvussu vildi tú ynskt, at upplýsingar um teg ella familju tína vórðu viðgjørdar?

- Um tað var teg upplýsingarnar viðvíkti,  vildi tú brýggjað teg um, at tær ikki vóru latnir víðari til onnur?



# At minnast til:

- Er talan um trúnaðar upplýsingarnar
- Hví eru upplýsingarnar neyðugar at lata víðari – hvør hevur brúk fyri hesum upplýsingum
- Hvør skal hava upplýsingarnar – eindarfyrisiting ella onnur fyrisiting
- Er talan um viðkvæmar/eymar upplýsingar ella aðrar trúnaðar upplýsingar
- Er samtykki givið – sjálvt um tað ikki er kravt
- Er borgarin kunnaður um, at upplýsingarnar fara at vera latnir øðrum

